# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja 15. mars 2008 ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági Sosiala deild, NSR tænastuna í Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara á tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosiala deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 3. mars 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
**Við Á 8 · 950 Porkeri**
**Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04**
**T-post: sosialadeild@email.fo**

# SISU

## SISU Cup á Kambsdali 22. og 23. februar

**VÍKINGUR skipar fyri SISU-innandura kapping í fótbólti fyri yngru deildirnar í Ítróttarhøllini á Kambsdali**

**aldursbólkar:**

1. Pinkur ...................... ('98-'99-´00)
2. Gentur 10-12 ........... ('96-'97)
3. Smágentur 12-14...... ('94-'95)
4. Gentur 14-17 ........... ('91-'92-´93)
5. Pinkulingar .............. ('00-'01)
6. Smápiltar.................. ('98-'99)
7. Piltar ........................ ('96-'97)
8. Smádreingir.............. ('94-'95)
9. Dreingir .................... ('92-'93)

Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Í deildunum gentir 14-17, dreingir og unglingar eru tó bert loyvt at hava 4 leikarar. 1 skiftisleikari kann verða á hvørjum liði.

Liðini skulu hava fótbóltsnøvn.
Heiðursmerki verða latin til trý tey bestu liðini í hvørjum aldursbólki.
Kostnaður kr. 250 fyri hvørt liðið.

**Tilmelding á hesum tlf:**
Anna 21 33 22 Jonna 22 45 65
Seinasta freist at melda til er:
**Mikudagin 20. februar kl 19.00**

**Víkingur**

## Stuðul í
# Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir stuðli at arbeiða 27 t/viku. Talan er um 22 t/viku at vera pedagogiskt mennandi hjá einum næmingi í 2. fl., meðan 5 t/viku eru til ein bólk á 3 næmingar í framhaldsdeildini.

Starvið er tíðaravmarkað frá 25. mars til 27. juni 2008.

**Søkt verður eftir stuðli, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og vera fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligur og nærlagdur

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í starvið, skal helst hava námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika. Fyrimunur er eisini, um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við næmingum við serligum tørvi.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. mars kl. 10

Setanarsamrøður verða í døgunum 3. til 6. mars

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til skúlastjóran ella varaskúlastjóran á tlf. 737761 ella 737762. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður · Tlf. 737760**

**Fuglafjarðar skúli** hevur í løtuni umleið 320 næmingar í 18 flokkum. Við skúlan starvast 33 lærarar, 5 stuðlar, 1 skrivari, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Í hesum skúlaárinum fer skúlin at arbeiða við at seta í verk fleiri menningarætlanir. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

## PARKERINGARANSARI

Eitt hálvtíðarstarv sum parkeringaransari í Klaksvíkar kommunu er leyst at søkja.

Arbeiðið kann verða lagt millum kl. 08.00 og kl. 22.00.

Starvið verður lønt samsvarandi lønarflokki 2 á 1. stigi í Starvsmannafelagssáttmálanum, eins og vaktargjøld verða latin fyri arbeiði eftir kl. 17.00 yrkadagar og um vikuskifti.

Umsøkjarin skal í minsta lagi vera 25 ára gamal og hava góða heilsu.

Umsóknin skal innihalda nærri upplýsingar um umsøkjaran eins og starvsroyndir.

Læknaváttan til vanligt koyrikort og møgulig viðmæli skulu liggja við umsóknini.

Umsóknin verður at senda landfútanum áðrenn 1. mars 2008.

FØROYA LANDFÚTI
Smyrilsvegur 20, Postboks 3018,
110 Tórshavn

Karen Marie Olesen



# Suðurstreymoyar Eystara Prestagjald

Søkt verður eftir sóknarpresti til Suðurstreymoyar Eystara Prestagjald vegna prest í barnsburðarfarloyvi og longdum farloyvi. Talan er um eitt fulltíðarstarv, ið er tíðaravmarkað frá 1. apríl til 15. august 2008. Starvið er skipað sum hjálp hjá dómpróstinum. Lønin er samsvarandi fyribils sáttmála við Fíggjarmálaráðið. Tænastubústaður er ikki til starvið. Einki íbúðar ískoyti verður givið. Umsøkjarar, ið ikki eru prestvígdir, mega senda prógv og váttan frá Prestaskúlanum saman við umsóknini. Umsóknin verður send til Biskupin, J. Paturssonargøta 20, Postsmoga 8, F0-110 Tórshavn. Umsóknin skal verða biskupinum í hendi í seinasta lagi tann 7. mars 2008, kl. 15.00. Stift@folkakirkjan.fo.

**Føroya Stiftsstjórn**
J. Paturssonargøta 20
Postrúm 12
FO- 110 Tórshavn

# FTS Timbur

**Alt timburarbeiði verður gjørt.**
**Serkønir í DECRA tøkum.**

**FTS Timbur**
**Tel 28 12 82**
**ftstimbur@ftstimbur.dk**